# Bygdin hevur bestan grip

Hugleiðingarnar, sum Jóannes Hansen, rektari á Føroya Læraraskúla, hevði, tá ið standmyndin við fiskafólkum varð avdúkað á sjómannadegnum í Klaksvík leygardagin 19. august



*Jóannes Hansen, rektari á Føroya Læraraskúla helt røðu, tá ið standmyndin við fiskafólkum varð avdúkað á sjómannadegnum í Klaksvík leygardagin 19. august*

**Mínir kæru bygdarfelagar! Góðu gestir!**

Nú um dagarnar er enn eina ferð at síggja í sjónvarpinum heimskenda sendingin Little House on the Prairie. Sendingarnar snúgva seg um nýbyggjarar í einum øki yviri í Ninnesota, har nógvir skandinavar settu seg niður í 1800 talinum. Tað eru endurminningarnar hjá Laura Ingalls Wilders, sum eru skrivaðar sum roman og seinni gjørdar til film.

Tað, sum eyðkennir lívið hjá hesum fólkunum, er intensitetur, gleði og fagnaður og vónbrot og sorg og so aftur hinvegin. Sveiggini eru stór, og hvussu tað gongst er tætt knýtt at, hvussu náttúran ber seg at.

Tað ræður um hart arbeiði, stríð og knoss, gott heyst og fullkomuliga miseydnað ár. Tað ræður um at nýta hugflogið fyri at skapa nýggjar loysnir og fyri at lata upp fyri nýggjum møguleikum.

Soleiðis hevur lívið eisini verið myndað kring vánna her í Klaksvík. Tað hevur verið stríð og baks fyri at yvirliva og síðani fyri at liva. Soleiðis var lívið í gomlu býlingunum á Biskupsstøð, í Gerðum, á Uppsølum og í Vági. Soleiðis var lívið úti í Klaksvík, tá ið úthandilin var latin upp har í 1838, og soleiðis var tað, tá ið bygdin tók at vaksa eftir at fríhandilin var komin í 1856.

Fyritreytin fyri lívinum broyttist. Fólkið sá nýggjar møguleikar, og fólkatalið tók at fjølgast. Tað var vágin sjálv, sum var snúðningsmiðdepulin. Eitt tað størsta takið var at fáa havnina at vera góðkend sum vetrarhavn hjá skipum. Tað varð gjørt skjótt eftir, at Klaksvíkar kommuna var vorðin sjálvstøðug fyri 98 árum síðani. Ketur til fortoyningar vórðu lagdar um vánna. Tá var nógv vunnið. Fólkatalið var í 1901 500, og eina hálva øld seinni var tað 3000!

Í stóru menningini hevur tað verið satsað. Viðhvørt hevur tað eydnast væl, og aðrar tíðir hevur tað ikki eydnast. Eitt dømi um, tá ið bogin varð høgt spentur, og tað ikki gekk eftir vild, var ferðin til Eysturgrønlands í 1959. Kjølbro átti hugskotið, og hann gjørdi ekspeditiónina út. Saman við framaskipinum Karin K, sum vit hildu vera framúr stásiliga skútu, vóru ellivu útróðrarbátar og tilsaman 133 menn.

Møguleikin fyri stuðli og veðhaldi var ikki, sum hann er tað nú. Á okkara døgum hevði ein sovorðin ferð – um hon yvirhøvur hevði komið upp á tal – verið gjørd við stuðli og veðhaldi úr landskassa og øðrum grunnum. Soleiðis var tað ikki fyri knappliga 50 árum síðani. Kjølbro hevði havt fingið vinningin, men tað eydnaðist ikki, og hann bar størsta partin av tapinum.

### Karmurin

Í dag fyri 51 árum fylti Bill Clinton níggju ár. Henda sama dagin vóru tað tvey telegram yvir Reykavíkar radio til føroyskar bátar undir Íslandi. Annað var til útróðrarbátin Barðið, sum Eivind Niclasen átti og førdi. Teir vóru undir Íslandi við 30 tonsaranum, sum Eivind fyrst átti saman við øðrum og seinni einsamallur. Seinni, tá ið Eivind saman við brøðrum lat byggja fyrstu Vesturvón, sum var línubátur, keypti Frits Olsen 30 tonsaran, sum hevði KG 335 og fekk navnabroyting til Lisshøvdið.

Barðið kom til Føroya í mai 1947. Veiðumaðurin liggur altíð framvið at slota eftir nýggjum møguleikum, nýggjum veiðihættum og nýggjum leiðum. Fyrstu árini eftir 2. heimsbardaga var hetta gamaní. Havið var so vítt, sum nýbyggjararnir mundu kenna landaligu víddirnar í Amerika at vera, tá ið teir ferðaðust vestureftir.

Hetta summarið – í 1955 – vóru Eivind og teir á Barðinum sum fyrsti føroyski báturin nakrantíð farnir yvir á Suðurlandið at royna eftir kalva og brosmu. Hesin veiðuhátturin royndist væl í nøkur ár, og teir vóru ikki so fáir, sum fingu sína úrtøku burturúr hesum.

So vóru tað hesi bæði telegrammini í dag fyri 51 árum síðani til føroyingar undir Íslandi. Tey vórðu send yvir Reykjavíkar radio. Annað var sorgarboð, og hitt var gleðiboð. Sorgarboðini vóru til ein hovbing, sum fekk at vita, at beiggi hansara, sum var politistur í Klaksvík og æt Jaspur Leivsgarð, brádliga var deyður henda dagin. Hann var bara 57 gamal.

Hitt telegrammið var til ein av monnunum umborð á Barðinum. Gleðiboðini til hansara vóru, at konan hevði átt honum ein son afturat. Tvey børn vórðu fødd í Klaksvík dagin í dag fyri 51 árum síðani. Bodil hjá John á Gørðum átti eina dóttur heima við hús her uppi á Gørðum, og Ragnhild hjá Karsteni í Svínoy átti ein drong á sjúkrahúsinum!

Tá ið eg hugsi um mína kæru heimbygd, og hvussu hon hevur ment seg til at vera tað, sum hon er í dag, so er tað hálva øldin frammanundan, at eg var føddur, og tann hálva øldin, sum eg havi livað, ið hevur myndað henda býin.

### Leivdin frá gomlu tíðini

Trolararnir komu og fóru, og tað var veldugt at sigla við Sjúrðabergi, Jóannesi Patursson ella Bóndanum og ikki minst Skálabergi, sum Kjølbro lat byggja í Týsklandi í 1956. Sluppirnar høvdu sæð sínar bestu dagar, tá ið eg var smádrongur. Fleiri lógu svínabundnar við kaiina, og tað segðist, at tað ýddi í rottum umborð á teimum. Men onkrar vóru framvegis í drift.

Fyrstu fótbóltsferðina av bygdini gjørdi eg til Gøtu. Tað var við Fimm Systrum, sum Símun Dávur á Húsum í 1939 hevði keypt av Skála. Hon var bygd í Hull í 1878 og bar navnið Only Sister. Í 1896 kom hon til Havnar og skifti fleiri ferðir eigara, áðrenn Absalon Jacobsen, keypmaður á Skála, keypti hana. Hann seldi hana til Símun Dáva í 1939.

Símun Dávur Kalsø var framúr grammur og áhaldandi. Tað skuldi vera hann, sum tók til orðatakið, sum so ofta verður nýtt um so mangt, at “Tann, sum ongan húkin hevur í sjónum, hann fær einki”.

Fótbóltsferðin var seinnapartin av seksti árunum, tá ið klaksvíkingar vóru so nógv bestir í fótbólti. Tað var á hesi ferðini, at eg uppdagaði, hvussu long og drúgv Gøtuvík er at sigla. Símun Dávur spilti ikki tíðina burtur. Hann spulaði dekk, meðan vit sigldu. Tá ið vit fóru um Gøtunes høvdu vit hug at leita eftir taskunum og at gera okkum klárar at fara í land. Tá mundi helmingurin av ferðini vera eftir!

Sigurfari, sum nú stendur á landi á Akranesi, var framvegis í drift. Tað var Ester, sum Símun á Syðradali so leingi var upsakongur við, eisini, og tað var Gudrun hjá teimum á Syðradali eisini. Eg minnist, at avbygdamenn fram til miðskeiðis í seksti árunum búðu umborð á Gudrun, meðan teir róðu út um vetrarnar. Soleiðis var tað eisini umborð á fleiri útróðrarbátum. Telefon var ikki í hvørjum húsi. Eg minnist, at tá ið vit fóru á telefonstøðina at senda telegramm – støðin var har, sum fíni sparikassin hjá okkum nú er – sótu útróðrarmenn stúvaðir saman í bíðirúminum og bíðaðu eftir, at telefondamurnar skuldu rópa í hátalaranum, at nú var tað greitt til Hattarvíkar, ella hvar tað nú var.

Tað var greitt, tá ið tey, sum

*Framhald á síðu 10*

